betri banki

# Avtala um íløgurøkt - Pensjón

Undirritaðu partar gera hervið avtalu um røkt av pensjón vísandi til niðanfyri standandi virðisbrævagoymslu og tilhoyrandi pensjónskontu í Betri Banka.

## Fulltrú

í tilknýti til íløgurøktaravtaluna gevur:

| Kundanavn | | P-tal |
|---|---|---|
| Bústaður | Postnummar | Bygd/Býur |

hervið:

**Betri Banka**
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

fulltrú vegna kundan og fyri kundans rokning at røkja og ráða yvir virðisbrøvum í virðisbrævagoymslunr.: ______________________

og hartil hoyrandi kontunr.: ______________________ , samsvarandi virkistreytum bankans fyri íløgurøkt

- pensjón. Útinnanin av hesi fulltrú er eisini bankans lógváttan mótvegis almennum myndugleikum.

## Endamálið við avtaluni

Endamálið við avtaluni, er at fáa størst møguligan vinning við atliti at íløguprofili, íløgutíðarskeiði og váðafýsni kundans. Betri Banki røktar eftir besta førimuni tey íløguaktiv, sum liggja í kundans virðisbrævagoymslu og omanfyri nevndu kontu og samsvarandi teimum treytum, ið eru galdandi fyri hesa avtalu.

## Íløguprofilur

Betri Banki ásetur saman við kundanum profil kundans samsvarandi teimum upplýsingum, ið kundin gevur Betri Banka í hesum sambandi. Profilurin er grundarlagið undir teimum íløgum, ið framdar verða kundans vegna.

Betri Banki og kundin eru komin ásamt um niðanfyri standandi íløguprofil:

## Íløguendamálið

Íløguendamál kundans fyri hesa avtalu er: Støðlan av innistandandi á pensjónskontu nr.: ____________________ í virðisbrøv.

## Íløgutíðarskeið

Kundans íløgutíðarskeið fyri hesa avtalu er galdandi fram til útgjaldsaldur.

## Váðastøði

Kundans váðastøði fyri hesa avtalu er:

☐ Varið ☐ Lágt ☐ Miðal ☐ Høgt ☐ Bert Partabrøv

Um týðandi broytingar henda við váðafýsni kundans, eigur kundin at seta seg í samband við Betri Banka skjótast til ber, soleiðis at íløguprofilur kundans kan tillagast skjótast til ber.

## Íløgusamanseting

Betri Banki ger íløgur kundans vegna samsvarandi íløguprofili kundans. Í fylgiskjali til valda váðastøði er nágreinað, hvat Betri Banki og kundin hava avtalað viðvíkjandi hvørji virðisbrævasløg, Betri Banki kann keypa kundans vegna, og hvussu vektingin av teimum ymisku virðisbrævasløgunum skal vera við atliti at íløguprofili kundans. Betri Banki ger av, hvørji einstøk virðisbrøv verða keypt innan fyri tey einstøku virðisbrævasløgini, og kann eisini leypandi broyta samansetingina av einstøku virðisbrøvunum. Atlit skal tó altíð takast til avtalaða yvirornað prosentvísa býti millum virðisbrævasløguni.

## Rebalancering og nýggj íløga:

Betri Banki rebalancerar goymslu kundans minst einaferð um árið, soleiðis at yvirornað prosentvísa býtið millum ymsu virðisbrævasløgini í goymslu kemur í samsvar við avtalaða yvirornaða býtið í fylgiskjali A. Um talan er um eftirløn, og kundin kundin regluliga fær inngjøld á kontu, so verður rebalancera kvartárliga.

## Tøkur peningur

Betri Banka er heimilað í tíðarskeiðum at millum nýggja íløgu og rebalancering at hava minni part ella partar av íløgufænum hjá kundanum standandi kontant á eftirlønarkontuni.

Eftirlønarkontan verður í løtuni rentað við: __________ %

## Váði

Betri Banki kann i hesi avtalu ikki tryggja kundanum nakað ávíst avkast av íløgunum, og avkastið kann í einstøkum tíðarskeiðum eisini gerast negativt.

## Kostnaður

Kostnaðurin fyri íløgurøktina er tilskilaður í fylgiskjali Kostnaður. Kundin er kunnaður um kostnaðin, áðrenn avtalan verður undirskrivað av báðum pørtum. Víst verður til treytir fyri íløgurøkt - Pensjón.

## Vanligar treytir fyri avtaluna

Afturat hesi avtalu eru niðanfyri standandi treytir og politikkir tengdir:

- Treytir fyri íløgurøkt - Pensjón
- Handilstreytir fyri virðisbrævahandil
- Goymslutreytir
- Politikkur um áhugamálsósemjur
- Ordraframjingarpolitikkur

Stendst tvídráttur í millum omanfyri nevndu treytir og sjálva íløguavtaluna, fær íløguavtalan framíhjárætt.

## Uppsøgn

Víst verður til treytir fyri íløgurøkt - Pensjón.

## Undirskrift

Kundin hevur móttikið avrit av hesari avtalu saman við »Treytum fyri íløgurøkt - Pensjón«, »Treytum fyri virðisbrævahandli«, og »Goymslutreytum«, hvørs innihald kundin váttar at verða kunnigur um.

__________________________ hin __________________________

Kundin ________________________________________ Vegna Betri Banka ________________________________________

# Kostnaður

Afturfyri íløgurøktina rindar kundin eitt fast gjald á ______________________ árliga av miðal ílagda virðinum, sum er í goymslu. Gjaldið fellur hálvárliga.

| Partabrøv | Lánsbrøv | Kostnaður |
|---|---|---|
| Yvir 50% | Undir 50% | 0,50% |
| Undir 50% | Yvir 50% | 0,30% |

## Handilskostnaðir

| Virðisbrøv | Handilskostnaður - av kursvirði |
|---|---|
| Børsskrásett partabrøv | 0,15% |
| Íløguprógv partabrøv | 0,15% |
| Íløguprógv lánsbrøv | 0,15% |
| íløguprógv stat-og realkreditlánsbrøv | 0,15% |

# Fylgiskjal - Varið

| | Varið | |
|---|---|---|
| **Aldur** | **Partabrøv** | **Lánsbrøv** |
| upp til 49 ár | 50% | 50% |
| 50-56 ár | 40% | 60% |
| 57-60 ár | 25% | 75% |
| 61-63 ár | 15% | 85% |
| 64-66 ár | 10% | 90% |
| 67 ár og eldri | 5% | 95% |



# Fylgiskjal - Lágt

| | Lágt | |
|---|---|---|
| **Aldur** | **Partabrøv** | **Lánsbrøv** |
| upp til 49 ár | 60% | 40% |
| 50-56 ár | 50% | 50% |
| 57-60 ár | 40% | 60% |
| 61-63 ár | 25% | 75% |
| 64-66 ár | 15% | 85% |
| 67 ár og eldri | 10% | 90% |



# Fylgiskjal - Miðal

| | Miðal | |
|---|---|---|
| **Aldur** | **Partabrøv** | **Lánsbrøv** |
| upp til 49 ár | 85% | 15% |
| 50-56 ár | 65% | 35% |
| 57-60 ár | 50% | 50% |
| 61-63 ár | 35% | 65% |
| 64-66 ár | 25% | 75% |
| 67 ár og eldri | 20% | 80% |



# *Fylgiskjal - Høgt*

| | *Høgt* | |
|---|---|---|
| ***Aldur*** | ***Partabrøv*** | ***Lánsbrøv*** |
| upp til 49 ár | 100% | 0% |
| 50-56 ár | 85% | 15% |
| 57-60 ár | 60% | 40% |
| 61-63 ár | 45% | 55% |
| 64-66 ár | 35% | 65% |
| 67 ár og eldri | 30% | 70% |



# Fylgiskjal – Bert Partabrøv

| | *Bert partabrøv* | |
|---|---|---|
| ***Aldur*** | ***Partabrøv*** | ***Lánsbrøv*** |
| upp til 49 ár | 100% | 0% |
| 50-56 ár | 100% | 0% |
| 57-60 ár | 100% | 0% |
| 61-63 ár | 80% | 20% |
| 64-66 ár | 60% | 40% |
| 67 ár og eldri | 40% | 60% |

